## Seinasta freist er 20. august

Nú styttist av álvara til freistina at senda inn sangir til sangkappingina, sum Føroya Sanglærarafelag skipar fyri. Freistin er 20. august. Nevndin, sum skal finna fram til teir vinnandi sangirnar er sett. Í henni eru Joanna Johansen, Óli Jákup Joensen, Oddfríður Rasmussen, Hans Pauli Tórgarð og Ásbjørn Berthelsen. Øll eru sang- og tónleikakøn og øll hava tilknýti til skúlaverkið. Meiri kann lesast um kappingina á heimasíðuni www.skulasangbokin.fo, sigur Føroya Sanglærarafelag



## 40 ára dagur

Hósdagin 21. august verður 40-ára dagurin hjá Det Norske Veritas í Føroyum hildin í Norðurlandahúsinum. Tiltakið er í høvuðsheitum ætlað vinnuni, avvarðandi myndugleikum, og annars øllum, sum hava áhuga í einari burðardyggari framtíð og umhvørvi. Tiltakið fevnir um tveor fyrilestrar, sum m.a. snúgva seg um eina burðardygga framtíð, orkukeldur, $CO_2$-útlát og alternativar framdriftsloysnir í skipavinnuni. Fyrilestrahaldarir verða Henrik O. Madsen, CEO, og Tomas Tronstad, granskingarleiðari – báðir frá DNV-samtakinum. Henrik O. Madsen er kendur fyri at verða framsøkin, kennir nakað til føroyska samfelagið og hevur fleiri ferð í 90`inum vitjað í Føroyum. Tiltakið í Norðurlandahúsinum er ókeypis. Nøkur pláss eru eftir. Áhugað kunnu ringja á tlf 35 37 50 ella senda ein teldupost til torshavn@dnv.com.

# Skræða samgonguskjalið og byrja av nýggjum



**Formaðurin í Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum, eru rørandi samdir um, at skulu teir upp í nakra samgongu, verður tað ikki sum ífylla hjá Eidesgaard og Hoydal**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Skulu Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin upp í nakra samgongu, verður tað undir ongum umstøðum sum ífylla hjá løgmanni og Høgna Hoydal.

Tað eru formaðurin í Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum so rørandi samdir um.

Í eini roynd at sleppa burtur úr politisku naggatódnini og at styrkja samgonguna, ætlar Jóannes Eidesgaard nú at tosa við Sambandsflokkin og Fólkaflokkin um at koma upp í samgonguna.

Men hetta kann verða lættari sagt enn gjørt, tí hvørgin teirra eru sinnaðir at fara upp í eina samgongu uttan víðari.

- Vilja teir hava okkum upp í at føra politikkin hjá samgonguni víðari eftir samgonguskjalinum, kunnu tey gott gloyma tað, staðfestir Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins.

- Skulu vit upp í, skal talan vera um eina nýggja samgongu og ein nýggjan politikki, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

### Fara at lurta

Jørgen Niclasen sigur, at fær Fólkaflokkurin fundarboð frá løgmanni, fara tey sjálvandi at vita, hvat hann hevur at bjóða.

- Men tað kemur undir ongum umstøðum upp á tal at Fólkaflokkurin fer at halda fram við tí politikki, sum er stungin út í CHE-samgonguskjalinum.

- Skulu vit upp í, skal talan verða um um ein nýggjan politikk við einum nýggjum samgonguskjali, tí hendan politikkin leggja vit ikki navn til.

Hann hugsar serliga um fiskivinnupolitikkin, har samgongan hevur sett sær fyri at seta fiskidagamarknað á stovn, tí tað vil Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um.

- Fólkaflokkurin vil heldur ikki leggja navn til skatta- og avgjaldspolitikkin hjá samgonguni, tí tað gongur bara út upp á at hækka skattir og avgjøld sigur formaðurin.

Jørgen Niclasen vil heldur ikki siga um talan skal vera um eina samgongu við trimum stórum flokkum, ella um fleiri flokkar skulu við.

- Teir tríggir stóru flokkarnir kundu í øllum førum tryggja tað politiska støðufesti, sum vit so staðiliga hava brúk fyri, sigur hann.

### Blandast av nýggjum

Formaðurin í Sambandsflokkinum sigur, at boðsendir løgmaður teimum, fara tey at lurta.

- Men skal talan vera um, at vit fara upp í eina samgongu, skal talan verða um heilt nýggjar samráðingar, har øll kortini verða blandað av nýggjum, bæði viðvíkjandi politiskum innihaldi, tal av flokkum í samgongu, hvussu landsstýrið skal skipast og um, hvussu málsøkini skulu býtast, sigur Kaj Leo Johannesen.

- Kemur ein stórur flokkur upp í samgonguna, skeiklast øll javnvágin og tað mugu vit leggja upp fyri. Men í øllum førum skulu vit byrja á sløttum borðum við nýggjum samgonguskjali og nýggjum politikki.

- Skal Sambandsflokkurin hava nakað við hetta at gera, verður hetta treytin, sigur Kaj Leo Johannesen.

Annars eru bæði Kaj Leo Johannesen og Jørgen Niclasen eisini so rørandi samdir um, at tað besta hevði verið, at løgmaður leggur frá sær og letur onkran annan floksformann sleppa at royna at skipa eina nýggja samgongu

Les meiri á síðu 2.

# Tað er skjótt meiningsleyst at halda fram í samgonguni

**Næstformaðurin í Tjóðveldinum hevur ringar vónir um eina framtíð við Sambandsflokkinum ella Fólkaflokkinum við í samgonguni. Hann mælir enn einaferð til at royna at fáa Sjálvstýrisflokkin sum fastan part í samgonguni**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað kann skjótt blíva meiningsleyst hjá Tjóðveldinum at halda fram í samgonguni.

Tað heldur Tórbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldinum.



*Tórbjørn Jacobsen sær svart upp á at fáa Sambandslokkin ella Fólkaflokkin upp í samgonguna. Hann mælir enn einaferð til at gera Sjálvstýrisflokkin til fastan lim í samgonguni við egnum umboði í Landsstýrinum*

Hann hevur ringar vónir til ætlanina hjá løgmanni at fáa antin Sambandsflokkin, ella Fólkaflokkin upp í samgonguna afturat fyri at styrkja politisku støðuna.

Tórbjørn Jacobsen hevur áður sagt fyri Sosalinum, at honum dámar CHE samgonguna ótrúliga væl, tí hann heldur, at hetta er einasta samgonga, sum er før fyri at loysa grundleggjandi trupulleikarnar í fiskivinnuni, eitt nú við at skipa ein fiskidagabanka, men eisini á eftirlønarøkinum og á skattapolitiska økinum

Hann hevur eisini sagt, at eftir hansara tykki er ongin loysn at fáa Fólkaflokkin ella Sambandsflokkin upp í samgonguna, tí eftir hansara tykki verður tað ómøguligt at fremja neyðugu broytingarnar saman við teimum.

Og hesa áskoðan hevur hann framvegis og tí hevur hann lítlar vónir um ætlanina hjá løgmanni at fáa Sambandsflokkin ella Fólkaflokkin upp í samgonguna.

- Fáa vit Fólkaflokkin upp í, er ovurhonds stórur vandi fyri, at vit missa allan vinnupolitikkin hjá samgonguni á gólvið og ikki fáa tikið tey stigini, sum bæði vit í Tjóðveldinum og Javnaðarflokkurin eru samd um, eru lívsneyðug. Fólkaflokkurin hevur jú boðað frá, at skal hann upp í samgonguna, skal tað vera fyri at føra fólkaflokspolitikk.

- Fáa vit hinvegin Sambandsflokkin upp í samgongunа, er ovurhonds stórur vandi fyri, at vit missa allan tjóðskaparliga profilin á gólvið og so skal Tjóðveldið sita í eini samgongu og umsita danska heimastýrið.

Næstformaðurin í Tjóðveldinum sigur, at tí er tað so ógvuliga skjótt at tað kann gerast púra meiningsleyst hjá Tjóðveldinum at halda fram í samgonguni.

- Í øllum førum verður talan um sera tórførar og ógvuliga drúgvar samráðingar og tíð hava vit ikki nógv av, tí longu um fimm vikur skal uppskot um fíggjarlóg fyri 2009 leggjast fyri Løgtingið.

- Sjálvandi veldst um, hvat samráðingarnar enda við, men í øllum førum síggi eg svart upp á vónirnar at fáa eitt betri samgonguskjal, enn vit hava nú.

### Skeivt at kasta frá sær

Hinvegin heldur Tórbjørn Jacobsen eisini, at tað órimiligt at Tjóðveldið skal tveita stjórnarvaldið frá sær fyri tað um ein tinglimur floksins skjýtir ímóti samgonguni og floksfeløgunum, soleiðis sum Heini O. Heinesen gjørdi í málinum um fiskidagarnar.

Tí er hann framvegis av teirri áskoðan, at besta loysnin er at fáa Sjálvstýrisflokkin sum fullgyldugan lim í samgonguni, so at hann eisini fær umboð í landsstýrið og at vit fáa eitt nýtt samgonguskjal.

Hann metir, at tað kundi verið ein samráðing, sum kundi fingist skjótt frá hondini, tí partarnir eru longu í samstarvi.

- Ein samráðing við Sjálvstýrisflokkin hevði uttan iva verið tann støðan, har vit høvdu sloppið við teimum minstu broytingunum í samgonguskjalinum og tað kundi tryggja politiskan arbeiðsfrið og støðufesti.

- Og tí er púra vist, at greiða má fáast á politisku støðuni heilt skjótt, leggur hann afturat.

Les meiri á síðu 2.